# Gerðabók býráðsfundur

**Dagfesting:** 16.12.2021 kl. 19:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Eivin Breiðaskarð, Magni Jøkladal, David Andreasen, Ólavur Larsen og Gudny Vang

Tiltakslimir: Lillian Jacobsen, sum møtti vegna Sonna á Horni, býráðslim, og Kristian Martin Petersen, sum møtti vegna Edvu Jacobsen

Ikki møtt:

Onnur:

Býráðsskrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| 51/21 | 21/00648-10 | Lillian Jacobsen innkallað sum tiltakslimur í sambandi við býráðsfundin tann 16. desember 2021 kl. 19:00 samsvarandi § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini. |
| 52/21 | 21/00536-11 | Kristian Martin Petersen innkallaður sum tiltakslimir í sambandi við býráðsfundin tann 16. desember 2021 kl. 19:00 samsvarandi § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini. |
| 53/21 | 21/00672-1 | Ásetan av fundardøgum hjá Fuglafjarðar býráð í 2022 |
| 54/21 | 21/00349-5 | Eivin Breiðaskarð_Uppskot um at gera part av matr. nr. 871e, Kambsdalur, til íbúðarbygging |
| 55/21 | 21/00662-2 | Dagføring av gjaldsskránni yvir vøru- og leigugjøld galdandi fyri økið 7 |
| 56/21 | 21/00491-6 | Tilmælið til sosialu Nevnd - Samstarv við MEA |
| 57/21 | 21/00645-2 | Eldraráð - eitt samstarv millum Eystur Kommunu og Fuglafjarðar Kommunu |
| 58/21 | 21/00629-8 | Samstarvsavtala millum sløkkiliðini í Eysturkommuna og Fuglafjarðar kommunu í samband við Leirvíkstunnilin sambært §§ 8, stk. 2 og 17 í tilbúgvingarlógini |

1

| | | |
|---|---|---|
| 59/21 | 21/00635-2 | Miki Lambastein_Leiga part av høll til vega- og gartnaradeildina úti á Kambsdali |
| 60/21 | 21/00661-2 | KJ-Hydraulik_Tilboð uppá feimaskinu_Talan er um multimaskinu av slagnum Timan 3300 |
| 61/21 | 20/00106-88 | Uppskot til semju millum Fuglafjarðar kommunu og Kappingareftirlitið í "loðsmálinum" við støði í rættarmeklingarfundi hjá Føroya Rætti tann 1. desember 2021 |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**51/21**
**21/00648-10 Lillian Jacobsen innkallað sum tiltakslimur í sambandi við býráðsfundin tann 16. desember 2021 kl. 19:00 samsvarandi § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 16.12.2021 | 51/21 |

**Tilráðing**

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Býráðnum. |
| Stutt lýsing | Sonni á Horni, býráðslimur, hevur forfall til komandi býráðsfund 16. desember 2021 kl. 19:00. Eftir ynski frá Sonna á Horni er tí tiltakslimurin Lillian Jacobsen kallaður inn til býráðsfundin. Henda innkallan sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Lillian Jacobsen er fjórðvaldi limurin á lista Á við 40 atkvøðum í sambandi við kommunuvalið 10. november 2020.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini - fyrst á fundinum 16. desember 2021 gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Lillian Jacobsen eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sonni á Horni, býráðslimur, hevur fráboða forfall til býráðsfundin 16. desember 2021. |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Kommunustýrislógin, kapittul 3**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Teldubrævasamskifti við borgarstjóran og Lillian Jacobsen, dagfest 13. desember 2021, í sambandi við innkallan av tiltakslimi til býráðsfund 16. desember 2021** |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nakað | Nei |
| | Umsitingarligar | Nakað | Nei |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at Lillian Jacobsen kann taka sæti sum tiltakslimur fyri Sonna á Horni, býráðslim, í sambandi við býráðsfundin 16. desember 2021. |
| Dagf | 16. desember 2021 |

**Býráðið 16. desember 2021:**
Býráðið samtykti 8-0, at fylgja tilmælinum frá borgarstjóranum og góðkendi, at Lillian Jacobsen kann taka sætið á býráðsfundi í kvøld.

## 52/21
## 21/00536-11 Kristian Martin Petersen innkallaður sum tiltakslimir í sambandi við býráðsfundin tann 16. desember 2021 kl. 19:00 samsvarandi § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 16.12.2021 | 52/21 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Býráðnum. | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing | Edva Jacobsen, býráðslimur, hevur forfall til býráðsfundin 16. desember 2021 kl. 19:00. Eftir ynski frá Edvu Jacobsen er Kristian Martin Petersen kallaður inn til býráðsfundin sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Kristian Martin Petersen er fjórðvaldi limurin á lista B við 46 atkvøðum í sambandi við kommunuvalið 10. november 2020.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini – fyrst á fundinum 16. desember gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Kristian Martin Petersen eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Edva Jacobsen, býráðslimur hevur forfall til býráðsfundin 16. desember 2021 kl. 19:00. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Kommunustýrislógin, kapittul 3**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>**Teldubrævasamskifti við Edvu Jacobsen, býráðslim, og Kristian Martin Petersen, tiltakslim, dagfest 15. desember 2021.** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur ið lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nakað | Nei |
| | Umsitingarligar | Nakað | Nei |
| Tilmæli | Dávur Juul, borgarstjóri, mælir til, at Kristian Martin Petersen kann taka sætið í Fuglafjarðar býráð í sambandi við býráðsfundin 16. desember 2021 kl. 19:00. | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Dagf | 16. desember 2021. |
|---|---|

**Býráðið 16. desember 2021:**
Býráðið samtykti 8-0, at fylgja tilmælinum frá borgarstjóranum og góðkendi, at Kristian Martin Petersen kann taka sætið á býráðsfundi í kvøld.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 53/21
## 21/00672-1 Ásetan av fundardøgum hjá Fuglafjarðar býráð í 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 16.12.2021 | 53/21 |

**Tilráðing**

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Býráðnum. |
| Stutt lýsing | Sambært kommunustýrislógini skulu borgarar vita, nær og hvar kommunustýrisfundir verða hildnir gjøgnum árið. § 13, stk. 1, 2. pkt. Í kommunustýrislógini er soljóðandi:<br><br>**§ 13.** Almannakunngjørt skal verða við ársbyrjan, nær og hvar vanligir kommunustýrisfundir verða hildnir.<br><br>Tí skal býráðið – nú síðsti býráðsfundur er í árinum – áseta fundardagarnar hjá býráðnum fyri 2022, har fundardagarnir verða hósdagar kl. 19:00 hesar dagar:<br><br>Býráðsfundir 2022:<br><br>27 januar<br>24 februar<br>31 mars<br>28 apríl<br>26 mai<br>23 juni<br><br>Summarferia<br><br>25 august<br>29 september<br>27 oktober<br>24 november<br>15 desember |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Ásetan av fundardøgum hjá býráðnum fyri 2022. |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt **§ 13, stk. 1, 2. pkt. í kommunustýrislógini**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **Uppskot hjá Dávur Juul, borgarstjóra, dagfest 6. desember 2021, um fundardagar hjá Fuglafjarðar býráð fyri 2022** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |
| Tilmæli | Borgarstjórin og kommunustjórin mæla til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til fundardagar hjá býráðnum fyri 2022, har tveir av fundunum verða hildnir ávíkavist í Kambsdali og á Hellunum. | | |
| Dagf | 9. desember 2021 | | |

**<u>Býráðið 16. desember 2021:</u>**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá borgarstjóranum um ásetan av fundardøgum fyri 2022, harav ein skal verða hildin á Kambsdali og ein býráðsfundur á Hellunum.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**54/21**
**21/00349-5 Eivin Breiðaskarð_Uppskot um at gera part av matr. nr. 871e, Kambsdalur, til íbúðarbygging**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 23.06.2021 | 55/21 |
| 2 Tekniska nevnd | 16.09.2021 | 88/21 |
| 3 Tekniska nevnd | 23.09.2021 | 92/21 |
| 4 Tekniska nevnd | 07.10.2021 | 97/21 |
| 5 Tekniska nevnd | 11.11.2021 | 102/21 |
| 6 Tekniska nevnd | 02.12.2021 | 112/21 |
| 7 Býráðið | 16.12.2021 | 54/21 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Umsitingin hevur fingið áheitan frá formanninum í teknisku nevnd um at skipa soleðis fyri, at gera eitt uppskot til broytan av parti av matr. nr. 871e, Kambsdalur, frá at vera fríøki, til at blíva byggiøki.<br>Sannandi er at vit í Fuglafjarðar kommunu mugu raðfesta tøkar bústaðarmøguleikar høgt, og verða fmammaliga hesum viðvíkjandi.<br><br>Partur av matr. nr. 871e er avlagt til alment øki, merkt E.<br><br>Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til loysn fyri økið 871e, Kambsdalur. Økið hongur saman við eini ætlan um rundkoyring hjá Landsverk, hetta fyri at binda høvuðsvegin í Kambsdal, og blenda nuverandi útkoyringar út í landsvegin, ella við øðrum orðum at gera landsvegin so fasaduleysan sum tilber. Víst verður til plantekning, FK j. nr. 21/00349-4.<br><br>**Ísoyti til fundin í teknisku nevnd 16. september 2021**<br>Tekniska deild hevur saman við TN gjørt eitt uppskot til íbúðarbygging á økinum niðan ímóti Børkugøtu og norður ímóti Fagragili. Innkoyringin verður frá Dalsvegnum, og útkoyringin verður frá Børkugøtu. Uppskotið leggur upp til trýggjar blokkar, har tann sunnasti og norðari er í einari hædd, og tann í miðjuni er í tveimum hæddum.<br>Til ber eisini til at deila tann eina blokkin í fýra raðhús, um áhugi er fyri tí, soleiðis at byggimynstrið verður meira fjøltáttað.<br>Atlit eru tikin til fríøkir, sum svara umleið til 10 % av víddini. |

9

| | |
|---|---|
| | Uppskotið leggur eisini upp til, at ein útstykking verður gjørd niðanfyri verandi útstykking, soleiðis at pláss verður fyri 8 grundstykkjum afturat.<br><br>**Ískoyti til fundin í teknisku nevnd 7. oktober 2021**<br>Tekniska deild hevur arbeitt víðari við økinum til fjøltáttaða íbúðarbygging.<br>Útbjóðingartilfar er gjørt, og tilfarið er sent út til trýggjar ráðgevarafyritøkur við umbøn um at geva tilboð at gera tvey uppskot, eitt fyri økið millum ánna og norður ímóti, og eitt uppskot, sum fevnir um sama øki, men har økið eystanfyri nýggju útstykkingina er tikið við, har lagt verður upp til at gera eina heildarloysn fyri økið.<br><br>Nevndin skal taka støðu til innkomnu tilboðini, og velja ein ráðgeva til at arbeiða víðari við at gera eina heildarætlan fyri økið.<br><br>**Ískoyti til fundin í teknisku nevnd 11. november 2021**<br>Tekniska deild hevur arbeitt víðari við at gera tvey uppskot til loysn í sambnadi við útstykkingarætlanina til fjølltáttaða bústaðarbygging á matr. nr. 871e, Kambsdalur. Víst verður til FK j. nr. 21/00349-13 og14.<br><br>Nevndin skal taka støðu til, hvørjum uppskoti arbeiðast skal víðari við, soleiðis at eitt neyvt uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri økið kann gerast og leggjast út til almenna hoyring, viðmerkingar og eftirlits við grundstøði í báðum uppskotunum.<br><br>**Ískoyti til fundin í teknisku nevnd 2. desember 2021**<br>Tekniska deild hevur arbeitt víðari við einum uppskoti grunda á uppskot nr. U4 og U5. Uppskotið verður umrøtt á fundinum til møguligar viðmerkingar.<br>Tekniska deild hevur havt fund við Umhvørvisstovuna um matrikulplanin fyri økið, soleiðis at hann samsvarar til krøvini hjá Umhvørvisstovuni.<br>Uppskotið leggur eisini upp til, at tilber at gera partar av útstykkingini uttan at neyðugt er at gera dýrar íløgur í vegir fyrst, har tankin er at íbúðarbyggingin kann fíggja ein part av einum komandi útstykkingarvegi.<br><br>**Ískoyti til býráðsfundin hósdagin 16. desember 2021**<br>Tekniska deild hevur arbeitt við eini fjøltáttaðari bústaðarætlan fyri part av matr. nr. 871e, Kambsdalur, sum innihaldur sethús, dupulthús, raðhús og íbúðarbygging, grundað á fyrr gjørd uppskot, U1-U8.<br>Samskifti hevur verið við Umhvørvisstovuna, hvørji viðurskifti eru galdandi fyri fjøltáttaða bústaðarbygging so sum matrikuler viðurskifti, atkoma hjá renovatión við meira.<br>Síðani er eitt endaligt uppskot gjørt, sum verður kallað "Samanumtøka frá U4 til U8". |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Tað eru 4 ymisk sløg av matriklum**

1. Til einbýlishús, sethús, har hvørt sethús hevur sín matrikul
2. Til tvíhús, har hvørt húsið sær hevur sín matrikul
3. Raðhús/randarhús, har hvørt húsið sær hevur sín matrikul
4. Bústaðarhús við fleiri íbúðum, hetta er 1 matrikul, men hvør íbúð skal hava íbúðarnummar afturat matrikulnummarinum

PS: U6 er nærum líka sum U7. Tí er bara U7 víst á tekninginni "Samanumtøka U4 til U8", sí FK j. nr. 21/00346-19.

**Fjøltáttaðir bústaðarmøguleikar_Yvirlit**

| Evni | Íbúðir | Matrikul |
|---|---|---|
| 7 sethús | 7 | 7 |
| Raðhús | 3 | 3 |
| 2 tvíhús við bilhúsi | 4 | 4 |
| 2 bústaðarhús við bilhúsi | 8 | 2 |
| Bústaðarhús | 14 | 1 |
| **Íalt** | **36** | **17** |

Íalt ymsir 36 bústaðir, ið liggja væl í mun til verandi á. Hædd er tikin fyri víðari útstykking omaneftir, hetta fyri at framtíðartryggja økið eystureftir.
Grøna økið er staðsett miðskeiðis í útstykkingarætlanini, og raðfest sera høgt í mun til burðardygd, við einum samlingsstaði við ánna.

Busslummi er í sambandi vi ðbústaðarøkið.

R= rusk. Krav er um at ávísa ruskøki til bústaðarhús.

**Vegaføringar**
Atkoman til útstykkingina er bæði frá Dalsvegi og Fagragili.
Uppskotið leggur upp til at minka vegaøkið mest møguligt. Atlit eru eisini tikin til parkering og vendipláss.
Hugsað verður eisini um at nýta parklampir til belýsning, soleiðis at talan verður um eina serstaka og hugnaliga fjøltáttaða bústaðarbygging.

**Ferðslutrygd**
Ferðslutrygdin verður innroknað í verkætlanina frá byrjan. Verkætlanin verður send inn til ferðslutrygdargrannskoðara, soleiðis at hon kemur at innihalda skelting, strîping og neyðugar ferðsluforðingar, áðrenn

| | |
|---|---|
| | útstykkingin verður gjøgd og tikin í nýtslu. Ein skelti- og stípiplanur og ein ferðslutrygdarplanur verða gjørdir, tá høvuðsprosjektið verður gjørt. |
| Bakgrund | Áheitan frá formanninum í teknisku nevnd og formanninum í orku- og umhvørvisnevndini um at broyta part av matr. nr. 871e frá fríøki til bústaðarøki, við tí fyri eyga at vera frammalaga í at hava bústaðarmøguleikar tøkar til allar borgarar. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Byggisamtyktin og BK17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00349-4 Plantekning_Uppskot um skipan av matr. nr. 871e, Kambsdalur<br>FK j. nr. 21/00349-7 Yvirlitskort_Uppskot til sethús, íbúðir og raðhús<br>FK j. nr. 21/00349-10 Eyðun Eliasen_Tilboð<br>FK j. nr. 21/00349-11 Fugløø Ark<br>FK j. nr. 21/00349-12 Skriv frá Nýrúm um at hann letur ikki tilboð inn<br>FK j. nr. 21/00349-13 Tekniska deild_Uppskot nr. U4 til fjøltáttaða útstykkingarætlan á matr. nr. 871e<br>FK j. nr. 21/00349-14 Tekniska deild_Uppskot nr. U5 til fjøltáttaða bústaðarbygging<br>FK j. nr. 21/00349-16 Tekniska deild_Uppskot nr. U7 til fjøltáttaða bústaðarbygging<br>FK j. nr. 21/00349-17 Tekniska deild_Uppskot nr. U8 til fjøltáttaða bústaðarbygging<br>FK j. nr. 21/00349-19 Tekniska deild_Samanumtøka av uppskotum frá U4 til U8 |

Viðgerð

| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at broyta part av matr. nr. 871e, Kambsdalur, frá at vera fríøki til at verða bústaðarøki, og broyta part av almennum øki til bústaðarøki. Víst verður kort við skravering.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í teknisku nevnd 16. september 2021**<br>Mælt verður til at heimila umsitingini til at arbeiða víðari við fleiri uppskotum, soleiðis at tilber at gera ein lokalplan fyri økið, sum nøktar ein tørv til bæði eldri og yngri borgarar og lesandi. |

| | |
|---|---|
| | Uppskotið leggur upp til ein fjøltáttaðan bústaðarmøguleika hjá borgarum í Fuglafjarðar kommunu.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í teknisku nevnd 7. oktober 2021**<br>Mælt verður til at nevndin tekur støðu til innkomnu tilboðini.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í teknisku nevnd 11. november 2021**<br>Tekniski leiðarin mælir til at arbeiða víðari við uppskoti nr. U4 og U5, og út frá uppskotunum gera eitt endaligt uppskot til broyting av byggisamtyktini til fjøltáttaða bústaðarbygging á økinum, og at broytingaruppskotið verður lagt út til almenna hoyring, viðmerking og eftirlits.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í teknsiku nevnd 2. desember 2021**<br>Tekniski leiðarin mælir nevndini til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti, sum er grunda á tvey fyrr gjørd uppskot, U4 og U5, og at leggja málið fyri býráðið til endaliga støðutakan, fyri síðani at leggja eitt broytingaruppskot serstaka byggisamtykt til almenna hoyring og efritlits.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í býráðnum hósdagin 16. desember**<br>Tekniski leiðarin mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd 2. desember, og at taka undir við lidna uppskotinum "Samanumtøka frá U4 til U8", fyri síðani broyta økið frá fríøki til bústaðarøki, og at leggja broytingaruppskot til serstaka byggisamtykt fyri økið til almenna hoyring og eftirlits. |
| Dagf | 17. juni 2021.<br>16. september 2021.<br>23. september 2021.<br>7. oktober 2021.<br>11. november 2021.<br>2. desember 2021.<br>16. desember 2021. |



<u>**Tekniska nevnd 23. juni 2021:**</u>
Nevndin samtykti at broyta part av matr. nr. 871e, og part av almennum øki til bústaðarøki, og at leggja málið fyri býráðið.

**Tekniska nevnd 16. september 2021:**
Nevndin samtykti at umsitingin arbeiðir víðari við einum útbjóðingarhátti at leggja fyri nevndia aftur til ein eykafund í komandi viku.

**Tekniska nevnd 23. september 2021:**
Nevndin samtykti at arbeiða víðari við málinum til næstkomandi fund, har miðjað verður eftir at fáa málið til viðgerðar í býráðnum til býráðsfundin í oktober, og at uppskotið verður sent til umsitingina, nevndarlimirnar og borgarstjóran til møguligar viðmerkingar.

**Tekniska nevnd 11. november 2021:**
Tekniska nevnd tekur undir við tilmælinum at arbeiða víðari við uppskoti nr. U4 og U5, og út frá uppskotunum gera eitt endaligt uppskot til broyting av byggisamtyktini til fjøltáttaða bústaðarbygging á økinum at leggja fyri nevndina aftur, fyri síðani at leggja málið fyri býráðið til endaliga støðutakan og avgreiðslu. Eftir hetta verður broytingaruppskotið lagt út til almenna hoyring, viðmerking og eftirlits.

**Tekniska nevnd 02. december 2021:**
Nevndin samtykti at broyta byggisamtyktina til fjøltáttaða bygging, sum inniber sethús, dupulthús, raðhús og íbúðarbygging, grundað á fyrr gjørd uppskot, U4-U8, og at uppskot til broytta byggisamtykt verður at leggja fyri býráðið til fundin í desember 2021.

**Býráðið 16. desember 2021:**
Býráðið samtykti einmælt, at broyta byggisamtyktina fyri matr.nr. 871e, Kambsdalur, frá fríøki til bústaðarøki og at broytta byggisamtyktin verður løgd til alment eftirlits. Í hesum sambandi ynskti býráðið eisini, at kommunala umsitingin kunnar um hesa íbúðarverkætlan á Kambsdali við tíðindaskrivi.

## 55/21
## 21/00662-2 Dagføring av gjaldsskviránni yvir vøru- og leigugjøld galdandi fyri økið 7

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 06.12.2021 | 51/21 |
| 2 Býráðið | 16.12.2021 | 55/21 |



### Tilráðing

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndini. |
| Stutt lýsing | Í viðtøkunum í sambandi við gjaldsskránna hjá Fuglafjarðar kommunu, so stendur í viðtøkunum, at gjaldsskráin skal eftirhyggjasst og eftirkannast árliga. Málið plagar at verða lagt fyri vinnu- og havnanevndina til síðsta fund á árinum.<br><br>Nenvdin skal taka støðu til møguligar dagføringar, og at gjaldsskráin verður endurskoðað. Víst verður til galdandi vøruskrá, sí FK j. nr. 21/00017-5, og notat frá fundi um neyðuga endurskoðan av gjaldsskránni, sí FK j. nr. 21/00017-17.<br><br>**Vørugjald, almennar reglur, pkt. 9**<br>*«Vøra, sum verður uppskipað og virka á havnarøkinum til útflutnings, og sum flutt verður yvir vegakervið, kemur undir galdandi reglur í vøruskránni, men er tó ikki umfatað av A. Almennar reglur, A10a».*<br><br>Umsitingin hevur í uppskoti, at tað verður broytt til:<br><br>*«Vøra, sum verður uppskipað og virka á havnarøkinum til útflutnings **umframt vøra, sum kemur úr øðrum havnum**, og sum flutt verður yvir vegakervið, kemur undir galdandi reglur í vøruskránni, men er tó ikki umfatað av A. Almennar reglur, A10a».*<br><br>**C3 Bátaleiga**<br>Tá samanlíkna verður við bátaleigu aðra staðni í landinum, verðu mett hóskandi at hækka bátaleiguna í Fuglafirði við 15 %.<br>Neyðugt er at kunna bátaeigarar í góðari tíð, áðrenn hækkingin verður sett í verk.<br><br>Nýtt punkt verður innført:<br><br>**C5 Bátaleiga á landi** |

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">Galdandi fyri bátar, sum standa á landi, so mælir umsitingin til at broyta vøruskránna soleiðis, at teir fyrstu 18 dagarnir er uttan kostnað, og teir nærstu dagarnir kosta kr. 30 kr./dag.<br><br>C3 í vøruskránni, olja<br>Eftir vegakervinum til vinnuligt virksemi verður gjaldið kr. 15/tons.<br><br>C1Be í vøruskránni, fiskaslógv<br>Neyðugt er at krevja upphæddina fyri fiskaslógv eftir vegakervinum, og broyta orðingina til at umfata vegakervið.<br><br>Ískoyti til býráðsfundin hósdagin 16. desember 2021<br>Málið varð viðgjørt á fundin í vinnu- og havnanevndini 6. desember 2021, har omanfyristandandi broytingar blivu samtyktar.<br>Víst verður til broytta gjaldskrá 2022-2025 eftir broytingum settar í gildi 01-01-2022, sí FK j. nr. 21/00662-6. Broytingarnar eru vístar við reyðum teksti.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Dagføring av gjaldsskránni galdandi fyri vøru- og leigugjøld.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>Gjaldsskráin yvir vøru- og leigugjøld fyri økið 7<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>FK j. nr. 21/00017-5 Gjaldsskrá 2017 – 2021 eftir broytingum settar í gildi 01. oktober 2019<br>FK j. nr. 21/00017-17 Notat frá fundi um møguliga endurskoðan av gjaldsskránni<br>FK j. nr. 21/00662-6 Gjaldskrá 2022-2025 eftir broytingum settar í gildi 01-01-2022</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Tekniski leiðarin mælir til at dagføra gjaldsskránna sambært viðtøkunum, og at broyta orðingar, soleiðis at øll virkir eru líka fyri gjaldsskránni.<br><br>Nýtt tilmæli til fundin í býráðnum hósdagin 16. desember 2021<br>Tekniski leiðarin mælir til at taka undir við samtyktini í vinnu- og havnanevndini 6. desember.</td></tr>
</table>

16

| | |
|---|---|
| | Nevndin samtykti, at umsitingin kunnar avvararndi partar, áðrenn broytingin verður sett í gildi. |
| Dagf | 3. desember 2021.<br>16. desember 2021. |

**Vinnu- og havnanevndin 06. december 2021:**
Nevndin samtykti at taka undir við at broyta fýra ymisk punktir, sum eru hesi:

1. Broyting av orðing í almennar reglur fyri vørugjald.
2. Broyting av leigu fyri bátapláss á sjógvi og á landi.
3. Kostnaður fyri oljuflutningi eftir vegakervinum.
4. Broyting av orðing fyri fiskaslógv (Eftir vegakervinum).

Nevndin samtykti, at umsitingin kunnar avvararndi partar, áðrenn broytingin verður sett í gildi.

**Býráðið 16. desember 2021:**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá vinnu- og havnanevndini og góðkenna uppskot til broytingar í skipa-, vøru- og gjaldskránni fyri Fuglafjarðar havn.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 56/21
## 21/00491-6 Tilmælið til sosialu Nevnd - Samstarv við MEA

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 08.11.2021 | 33/21 |
| 2 Býráðið | 16.12.2021 | 56/21 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Sosialu Nevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing | MEA - húsið fyri familjumenning, er ein stovnur, ið virkar fyri at skapa góð sambond millum menniskju bæði í parlagi og uttan fyri parlag.<br><br>MEA ynskir at gera samstarvsavtalur við fleiri kommunur. Við eini samstarvsavtalu fær samstarvskommunan bjóða:<br>• At øll pør, ið hava barn við tørvi, fáa ókeypis par-skeið<br>• At øll foreldur, ið eru farin hvør til sítt, fáa ókeypis foreldrasamstarvsskeið<br>• At hvør familja, ið kommununi, kann fáa 5 tímar ókeypis familjuráðgeving<br><br>Talskvinnan hjá MEA hevur biði um møguleika fyri at koma og halda eina framløgu.<br><br>Fyrispurningurin frá MEA bleiv viðgjørdur á fundi hjá Sosialu Nevnd í oktober. Sosiala Nevnd ynskti, at málið bleiv tikið upp við barnaverndartænastuna, fyri at fáa avgreitt, um tørvur er á eini samstarvsavtalu. Hettar tí at MEA í 2018 hevði eina framløgu fyri táverandi Sosialdeildarleiðara og leiðaranum fyri barnaverndina. Sosiala Nevnd Viðgjørdi tá eina umsókn um samstarv. Tá bleiv lagt upp til eina trý ára samstarvsavtalu. Prísurin var 30 kr. pr. borgara pr. ár, svarandi til knapp 50.000 kr. um árið.<br><br>Nevndin fann uppskotið um samstarv áhugavert, men umrøddi eisini, hvussu langt ein kommuna skal fara inn í privat viðurskiftir hjá foreldrum. Nevndin hevði ikki tøkan pening til eina samstarvsavtalu, sum tá kostaði umleið kr. 50.000 árliga í 3 ár. Samstundis metti nevndin, at um peningur hevði verið tøkur, vildi nevndin heldur raðfesta, at økja játtanina til dagstovnarnar, og á tann hátt geva starvsfólkunum betri umstøður til at taka sær av familjunum. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Í eini framløgu, fer MEA aftur at leggja upp til eina samstarvsavtalu. Enn kenna vit ikki tað ítøkiliga innihaldi, men væntandi er talan um eina líknandi avtalu sum fyri trimum árum síðani.<br><br>Afturmeldingin frá Barnaverndini var, at tað fyri barnaverndarnevndini yvirskipað er relevant at arbeiða við eini fyribyrgingarætlan, og at ein samstarvsavtala við MEA væl kann síggjast sum ein partur av eini tílíkari ætlan. Avtalan bleiv tí, at skjóta upp fyri barnaverndarnevndini, at MEA kom og gjørdi eina framløgu fyri teimum.<br><br>Í hesum sambandi bleiv Trivnaðarleiðaran í Eystur Kommunu kontaktaður. Hann upplýsti, at MEA longu hevur haft eina framløgu fyri Trivnaðarnevndini í Eystur Kommunu sum hevur gjørt tilmæli til býráðið um eina samstarvsavtalu. Tí hevði ein framløga frá MEA fyri Barnaverndarnevndina ikki áhuga.<br><br>Ì samráð við Nevndarformannin fyri Sosialu Nevnd er avtala tí gjørd við MEA um eina framløgu á fundinum í Sosialu Nevnd tann 8. november. Við útgangsstøði í framløguni, kann Sosiala Nevnd taka støðu til, um ein samstarvsavtala skal tilmælast ella ikki.<br><br>**Kunning á Býráðsfundi 16. desember 2021**<br>Ein samstarvsavtala við MEA var, sambært avgerðini i fundi hjá Sosialu Nevnd tann 8. Novembur treyta av, at peningur kundi finnast til avtaluna á fílgjarjáttanini. Peningur er settur av til samstarvsavtaluna á fílgjarjáttanini fyri 2022.<br><br>Eftir ætlan verður samstarvsavtalan við MEA undirskriva av borgarstjóra Dávur Juul og MEA fríggjadagin 17. desember 2021. Kunna verður um samstarvið á heimasíðuni og facebook-vanganum hjá Fuglafjarðar Kommunu. Dagstovnarnir og skúlin fáa eisini kunnandi tilfar um tilboðið. |
| Bakgrund | Fyrispurningur frá MEA |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>**Barnaverndarlógin**<br>**Ymisk almannalóggáva**<br>**Kommunustýrislógin**<br><br>• Møgulig fylgiskjøl |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | Uppskot til samstarvsavtalu við MEA, dagfest 6. desember 2021 | | |
|---|---|---|---|
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Mælt verður til, at Sosiala Nevnd, við støði í framløguni frá MEA, til-ella frámælir at gera eina samstarvsavtalu við MEA.<br><br>**16. desember 2021**<br>Mælt verður til, at Fuglafjarðar Býráð góðkennir uppskot til samstarvsavtalu við MEA. | | |
| Dagf | 2. november 2021 og 7. Desember 2021 | | |

**Sosiala nevnd 08. november 2021:**
Nevndin metti, at talan var um eitt gott fyribyrgjandi tilboð sum, og at Fuglafjarðar Kommuna skal gera eina trý ára samstarvsavtalu við MEA. Samstarvsavtalan kostar kr. 30 pr ár pr. íbúgva í kommununi um ári, svarandi til kr. 48.000 kr. árliga í trý ár. Útreiðslan verður tikið við í arbeiðinum við rakstrarjáttanina fyri 2022.



**Býráðið 16. desember 2021:**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá sosialu nevnd og góðkenna samstarvsavtaluna við MEA.

**57/21**
**21/00645-2 Eldraráð - eitt samstarv millum Eystur Kommunu og Fuglafjarðar Kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 29.11.2021 | 40/21 |
| 2 Býráðið | 16.12.2021 | 57/21 |



**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Sosiala Nevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing | Í løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m., er ásett í §6<br><br>*«§6. Kommununarnar skulu tryggja, at borgarar í størst møguligan mun hava møguleika at verða hoyrdir, tá týðandi umskipanir, bygnaðarbroytingar o.t. verða framdar, sum hava ávirkan á tænastuna í økinum.*<br>*stk. 2, komunurnar kunnu seta á stovn eldraráð í økinum, sum verða tikin við upp á ráð, tá avgerðir og umskipanir innan økið skulu fremjast.»*<br><br>Leiðslan í Nánd metir, at tørvur er á einum eldraráð, og at eitt eldraráð mest skynsamt verður sett á stovn í einum samstarvi ímillum Fuglafjarðar Kommunu og Eysturkommunu.<br><br>Umhvørvis- og trivnaðarnevndin í Eysturkommunu hevur ummælt máli á fundi í maj 2021, og samtykti, at umsitingin skuldi arbeiða víðari við málinum, og koma við einum uppskoti til viðtøkur v.m. at leggja fyri nevndina. Onki er hent í málinum fyrr enn nú, tí bíða hevur verið eftir nýggjum sosialdeildarleiðara í Fuglafjarðar Kommunu, sum kundi samstarva við Eysturkommunu og Nánd um málið.<br><br>Fyrisitingin í Nánd, Eysturkommunu og Fuglafjarðar Kommunu hava nú orða eitt uppskot til viðtøkur fyri eitt komandi eldraráð.<br><br>Vert er at leggja til merkis, at eitt eldráð kann brúkast sum eitt ráðgevandi organ hjá kommununum og hjá Nánd. Ráðið kann eisini av sínum eintingum siga kommununum/nánd sína hugsan um eitthvørt evni av almennum áhuga fyri tey eldru, koma við hugskotum og uppskotum og seta spurningar. Talan kann tá verða um mál, sum liggja uttanfyri yrkisøkið hjá Nánd. Dømir uppá hettar er uppskot um eldrabústaðir ella uppskot sum handla um reingerð. |

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">Í uppskotinum til viðtøkur fyri eitt komandi eldraráð verður mælt til, at val til eldraráðið er 4. hvørt ár í sambandi við kommunustýrisvalið. At íbúgvarnir í hvørjari kommunu velja síni umboð til eldraráðið og at hvør kommuna fær 3 umboð.<br><br>Fyrisitingin leggur upp til, at fyrsta val til eldraráð verður skipað áðrenn næsta kommunustýrisval, og at fyrsta seta tí verður styttri enn 4 ár, og at val til eldraráð hereftir verður samstundis sum val til kommunustýrið.<br><br>Viðgerð á Býráðsfundi 16. Desember 2021<br>Á fundi í Sosialu nevnd 29. november 2021 samtykti Sosiala nevnd at leggja uppskot fram fyri Fuglafjarðar Býráð um at seta á stovn eldraráð saman við Eysturkommunu.<br><br>Uppskotið til viðtøkur fyri eldraráð bleiv umrøtt. Sosiala nevnd legði upp til at broyta viðtøkurnar so borgarar, sum valdagin hava fylt 60 ár hava valbærið. Í uppskotinum var lagt upp til at borgarar sum valdagin hava fylt 18 ár høvdu valbærið.<br><br>Harafturat ynskti Sosiala nevnd at broyta §6 stk. 2 so tað framgongur av viðtøkunum, at samsýning hægst kann gevast fyri 12. fundir árliga.<br><br>Í Eysturkommunu hevur viðgerðin av uppskotinum verið fyri í Trivnaðarnevndini og á býráðsfundinum í november. Uppskotið bleiv samtykt uttan broytingar.</td></tr>
<tr><td>Bakgrund</td><td colspan="3">Málið verður tikið upp eftir ynski frá fyrisitingini í Nánd</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>Løgtingslóg nr. 19. frá 7. apríl 2014 um heimatænastum eldrarøkt v.m.<br><br>• Møgulig fylgiskjøl<br>Uppskot til viðtøkur fyri eitt komandi eldraráð</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Nei</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Fundur í Sosialu nevnd 29. november 2021<br>Mælt verður til at:</td></tr>
</table>



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | 1) Sosiala nevnd tekur støðu til, um Fuglafjarðar Kommuna skal seta eitt eldraráð á stovn saman við Eysturkommunu<br><br>Um ja:<br><br>2) At Sosiala nevnd tekur støðu til uppstotið til viðtøkur fyri eldraráðið.<br><br>3) At Sosiala nevnd fylgir tilmælinum frá fyrisitingini um at seta á stovn eldraráð áðrenn næstkomandi kommunustýrisval, og at fyrsta seta í eldraráðnum tí verður styttri enn 4 ár.<br><br>**Býráðsfundur 16. desember 2021**<br>Mælt verður til at:<br><br>1) býráðið tekur støðu til, um Fuglafjarðar Kommuna skal seta eitt eldraráð á stovn saman við Eysturkommunu<br><br>Um ja:<br><br>2) At Býráðið tekur støðu til uppskotið til viðtøkur fyri eldraráðið. Herundir eisini broytingaruppskotini frá Sosialu nevnd<br><br>3) At Býráðið fylgir tilmælinum frá Sosialu nevnd um at seta á stovn eldraráð áðrenn næstkomandi kommunustýrisval, og at fyrsta seta í eldraráðnum tí verður styttri enn 4 ár. |
| Dagf | 18. november 2021 og 7. Desember 2021 |



**<u>Sosiala nevnd 29. november 2021:</u>**
Sosiala nevnd tekur undir við at seta Eldraráð á stovn saman við Eysturkommunu

Sosiala nevnd ynskti at broyta valbærið soleiðis at limirnir í eldraráðnum eru 60 ár og eldri (§5 stk. 2)

Sosiala nevnd ynskir at broyta §6 stk. 2. so tað framgongur, at samsýning max kann gevast fyri 12 fundir árliga.

Sosiala nevnd fylgir tilmælinum um at seta á stovn eldraráð áðrenn næstkomandi kommunustýrisvæl, og at fyrsta seta í eldraráðnum tí verður styttri enn 4 ár.

**Býráðið 16. desember 2021:**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá sosialu nevnd, og góðkendi at gera samstarvsavtalu við Eysturkommunu um at skipað eitt Eldraráð, har Nánd er fakligi myndugleikin á økinum. Býráðið ynskti í hesum sambandi, at sosiala nevnd kannar, um tað er møguligt, at ein limur í eldraráðnum úr hvørjum øki er undir 60 ár.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 58/21
## 21/00629-8 Samstarvsavtala millum sløkkiliðini í Eysturkommuna og Fuglafjarðar kommunu í samband við Leirvíkstunnilin sambært §§ 8, stk. 2 og 17 í tilbúgvingarlógini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 06.12.2021 | 53/21 |
| 2 Býráðið | 16.12.2021 | 58/21 |

### Tilráðing

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevndini. |
| Stutt lýsing | Stuttlýsing av málinum |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Uppskot til samstarvsavtalu millum sløkkiliðini í Eysturkommunu og Fuglafjarðar kommunu um praktiskt samstarv í sambandi við sløkking og bjarging í Leirvíkstunnlinum er gjørd við heimild í §§ 8, stk. 2, 9, stk. 2, 17 og 18 í tilbúgvingarlógini – løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving, sum broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020.<br><br>Tilbúgvingarstøðin hjá sløkkiliðnum í Eysturkommunu er í Leirvík, og hevur tí avmarkaðan møguleika til at koma við útgerð til bjarging og átak frá báðum síðum av, tá tað er brúk fyri sløkking og bjarging í Lervíkstunnlinum.<br><br>Grundað á hesi viðurskifti er uppskot til avtalu gjørd millum sløkkiliðið í Fuglafirði um at koma sløkkiliðnum í Eystur kommunu til hjálpar, um á skuldi staðið.<br><br>Kommunustjórin hevur sent uppskotið til hoyringar hjá umsitingini og tilbúgvingarleiðaranum í Fuglafjarðar kommunu, har lagt verður upp til, at vinnu- og havnanvendin tekur málið upp til viðgerðar, og kemur við møguligum viðmerkingum til málið.<br><br>Vinnu- og havnanevndin skal taka støðu til, um uppskotið kann góðkennast, sum tað er fyrilagt, ella nevndina kann koma við viðmerkingum til málið.<br><br>**Framhald 12. desember 2021**<br>Uppskotið til samstarvsavtalu hevur verið viðgjørt í tilbúgvingarnevndini og vinnu- og havnanevndini, umframt at tað hevur verið til viðmerkingar hjá viðkomandi starvsfólkum hjá Fuglafjarðar kommunu. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | Harumframt er uppskotið um avtalu sent Eysturkommunu tann 8. desember í ár, haðani uppskotið er komið, tí tað er Eysturkommuna, sum hevur ábyrgd av tilbúgvingini í Leirvíkstunnlinum. Eysturkommuna hevur enn ikki svara, um samstarvsavtalan er góðkend frá teirra síðu, men væntandi verður fyriliggjandi uppskot góðkent av Eysturkommunu.<br><br>Tí er ein møgulig góðkenning frá Fuglafjarðar býráð av uppskotinum til samstarvsavtalu um sløkking og bjarging í Leirvíkstunnlinum treytað av góðkenning av uppskotinum frá Eysturkommunu, sum væntandi fer at góðkenna fyriliggjandi uppskot, sum er í trá við tilbúgvingarlógina. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Tilbúgvingarlógin<br><br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>Uppskot til samstarvsavtalu um sløkking og bjarging í Lerivíkstunnlinum<br>Teldubrævasamskifti við umsitingina, dagfest 2. desember, og Eysturkommunu, dagfest 8. desember 2021 |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir vinnu- og havnanevndini til at koma við møguligum viðmerkingum til uppskot um smstarvsavtalu um sløkking og bjarging í Lerivíkstunnlinum, áðrenn málið verður viðgjørt í býráðnum í desember 2021.<br><br>**Framhald 12. desember 2021**<br>Kommunustjórin mælir Fuglafjarðar býráð til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til samstarvsavtalu við Eysturkommunu um praktiskt samstarv í sambandi við sløkking og bjarging í Leirvíkstunnlinum treytað av einari væntandi góðkenning frá Eysturkommuna. |
| Dagf | 6. desember 2021/12. desember 2021 |

**Vinnu- og havnanevndin 06. december 2021:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum við teirri viðmerking, at kannast skal, hvørt eyka krøv verða stillaði til Fuglafjarðar sløkkilið til hendan sáttmálan. Onki er nevnt um hetta í uppskotinum til sáttmála.

**Býráðið 16. desember 2021:**
Býráðið samtykti við 8 atkvøðum fyri og 1 ímóti, at fylgja tilmælinum frá tilbúgvingarnevndini og vinnu- og havnanevndini, og góðkenna samstarvsavtaluna við Eysturkommunu um sløkking og bjarging í Leirvíkstunnlinum, har býráðið ynskti at avtalan verður áramálssett, tá avtalan er eftirmett í seinasta lagi við ársenda 2023. Fyri málinum atkvøddu Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Eivin Breiðaskarð, Magni Jøkladal, David Andreasen, Kristian Martin Petersen, Gudny Vang og Lillian Jacobsen. Ímóti atkvøddi Ólavur Larsen.

27

## 59/21
## 21/00635-2 Miki Lambastein_Leiga part av høll til vega- og gartnaradeildina úti á Kambsdali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 11.11.2021 | 108/21 |
| 2 Tekniska nevnd | 02.12.2021 | 109/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.12.2021 | 54/21 |
| 4 Býráðið | 16.12.2021 | 59/21 |

28

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Vega- og gartnaradeildin og húsavarðartoymið hava brúk fyri betri hølisviðurskiftum til dagliga arbeiði sítt.<br>Vísandi til eina eftirlitsfrágreiðing frá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum, so er neyðugt hjá kommununi at finna fram til eina varðandi loysn á trupuleikanum.<br><br>Í sambandi við, at Miki Lambastein hevur ætlanir um at byggja eina høll á Kambsdali, so hevur hann verið opin fyri møguleikanum at leiga part av høllini til vega- og gartnaradeildina og húsavarðartoymið hjá kommununi.<br><br>Hendan leiguavtalan hevði verið til gagns fyri báðar partar sum ein fyribilsloysn á hølistørvinum hjá kommununi, inntil ein varandi og endalig loysn liggur á borðinum fyri kommununa.<br><br>Nevndin skal taka støðu til, um umsitingin kann arbeiða víðari við at finna eina góða avtalu um at leiga hølir frá Miki Lambastein, har gjørd verður tíðarlinja og uppskot til kostnað fyri leigumálið.<br><br>Hendan loysnin inniber, at rakstrargøgnini hjá vega- og gartnaradeildini og hjá húsavarðartoyminum kunnu standa innandura í eini høll, sum er isolerað.<br>Neyðugt verðu eisni við arbeiðsborðum, skrivstovu v.m. Kaffiskúrðarnir á kaini kundu verði nýttir bæði av vega- og gartnaradeildini og húsavarðartoyminum. |

| | |
|---|---|
| | Støða skal eisini takast til, um virksemið á Gamla Meka og á Gomlu Brandstøðini skal umskipast, um loysnin við einum leigumáli verður veruleikin.<br><br>Ein ítøkjuligur fundur hevur verið millum Miki Lambastein og umsitingina mikudagin 10. november, har kommununi stendur í boði at leiga 2/3 av eini høll, sum er 15*30 m. Høllin er 4,2 m høv úti við síðurnar, og 6,2 upp til mønu.<br>Byggibúningin av grundøkinum er í gongd, og eftir ætlanini skal høllin standa liðug komandi summar.<br>Høllin kemur at standa eystur og vestur niðan ímóti niðara vegnum, sum gongur inn til vinnuøkið, har virksemið hjá Kes.fo kemur at búleikast í vestasta partinum, og kommunan fær niðara partin av høllini. Møguleiki verður fyri at gera skrivstovur, skiftingarrúm og matarsal til vega- og gartnaradeildina og húsavarðartoymið.<br><br>Eisini skal takast støða til at heimila umsitingini at fara í samráðingar við Miki Lambastein um leigusáttmála við langtíðarleigu fyri eyga, har leiguavtala verður gjørd fyri eitt ávíst áramál, har møguleiki er hjá báðum pørtum at leingja ella siga upp avtaluna millum partarnar.<br><br>**Ískoyti til fundin í teknisku nevnd 2. desember 2021**<br>Tekniska deild hevur arbeitt við at gera uppskot til leigusáttmála í sambandi við leiguavtalu millum Kes.fo og Fuglafjarðar kommunu.<br>Avtalan fevnir um, at Kes leggur vatn, el. Telefon og kloakk inn í bygningin og bindir í kommunana kloakk. Eisini verður ein oljuútskiljari settur upp, soleiðis at byggingin og virksemið lýkur umhvørviskrøvini.<br>Kes.fo skipar soleiðis fyri, at møguleiki er hjá starvsfólkunum at fáa eitt rúm til saniter viðurskifi, og eitt høli, sum kann nýtast til skrivstovu og matarsal.<br>Tekniska deild er í gongd við at tekna eina innrætting av hølunum íroknað tekniskar leiðingar og at skipa uttanumøkið, soleiðis at til ber at hava arbeiðsamboð á økinum og til at parkera arbeiðsbilar og privatbilar hjá starvsfólkunum á økinum.<br>Ætlanin hjá kommununi er at nýta høllina til at hava amboð, bilar og maskinur standandi inni, og til goymslu. Eisini verður møguleiki fyri at gera ymiskt arbeiði, sum hoyrir til eina vega- og gartnaradeild hjá eini kommunu.<br><br>**Tíðarætlan**<br>Útgravingin er í gongd, og miðjað verður eftir, at sokkulin til høllina stendur liðugur í mai 2022.<br>Eftir ætlan stendur høllin uppi til komandi summar.<br><br>**Ískoyti til fundin í fíggjarnevndini mánadagin 13. desember 2021** |

| | |
|---|---|
| | Tekniska nevnd viðgjørdi uppskot til leigusáttmála við Kes.fo um leigu av høll á Kambsdali til vega- og gartnaradeildina og húsavarðartoymið, har leigukostnaðurin er kr. 50,- fyri fermeturin, ella kr. 25.000,- íroknað 25 % mvg.<br>Tekniska nevnd legði á fíggjarlógini fyri 2022 pening av til endamálið. Fuglafjarðar kommuna hevur fingið skriv frá arbeiðs- og brunaeftirlitinum um, at umstøðurnar hjá starvsfólkunum á vega- og gartnaradeildini ikki eru nøktandi. Í hesum sambandi hevur tekniska deild saman, við nevndini, arbeitt við at fáa eina fyribils loysn, og at leiga hølir frá Kes.fo til arbeiðsfólkið. Eisini er neyðugt at fáa rakstrargøgn kommununar inn undir tak, serliga tá hugsað verður um, at tekniska dield hevur gjørt íløgur í nýggj amboð so sum feimaskinu, beltimaskinur og lessarar, og annan útbúnað til vega- og gartnaradeildina og húsavarðartoymið.<br><br>Leiguavtalan inniber, at Kes.fo ger tað møguligt hjá kommununi at innrætta hølir til kaffistovu, wc og skiftirúm, men hetta kemur kommunan at gjalda fyri umframt. Hetta kann verða ein fyrimunur, soleiðis at fólkið á vega- og gartnaradeildini ikki nýtast at fara inn í býin, hvørja ferð tað er ein matarsteðgur ella døgverðasteðgur.<br><br>Ein annar møguleiki er at seta verandi skúrðar á vegadeildini út á Kambsdal sum eina fyribilsloysn. Teir skúrarnir innihalda matarsal og køk, skrivstovu, skiftingarrúm og tvey wc.<br><br>Møguleiki verður eisini fyri at leggja dekk í part av høllini, soleiðis at tvær skrivstovur og ein størri matarsalur kunnu innrættast á aðru hædd, men hetta er ein størri íløga, sum ikki eru settir pengar av til í 2022.<br><br>Tekniska deild arbeiðir eisini við eini ætlan um at innrætta part av FK-bygninginum til vega- og gartnaradeildina og húsavarðartoymið, sum eina fasta basu í Fuglafirði, soleiðis at møguleiki er fyri at fáa køk, skiftingarrúm og matarsal. Men her eru ikki peningur settur at til endamálið í 2022. Skrivstovur kunnu koma seinni.<br><br>Fíggjarnevndin skal taka støðu til, um hon tekur undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd 2. desember.<br><br>**Framhald 13. desember 2021**<br>Fíggjarnevndin samtykti á fundi í dag, at mæla býráðnum til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til leigusáttmála millum fyritøkuna KES og Fuglafjarðar kommunu; men har fíggjarnevndin ynskti, at leigumálið varð settur niður frá 10. til 5 ár og at kommunan bert ger neyðturviligar íløgur í bygningin, sí samtyktina hjá fíggjarnevndini niðanfyri á hesum skjali. |

<table>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Hølistrupulleikar á vega- og gartnaradeildini og húsavarðartoyminum.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>Kommunulógin og fyrisitingarlógin og lógin um arbeiðsviðurskifti<br>• Møgulig fylgiskjøl<br>FK j. nr. 21/00635-4 Uppskot til leigusáttmála<br>FK j. nr. 21/00635-6 Kes_Miki Lambastein_Viðmerkingar til uppskot til leigusáttmála<br>FK j. nr. 21/00635-7 FK-kjallarin_Uppskot til innrætting sum basu til vega- og gartnaradeildina og húsavarðartoymið</td></tr>
<tr><td colspan="4" align="center">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>Ja</td><td>Ja</td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Tekniski leiðarin mælir til at fara í samráðingar við Miki Lambastein um eina leiguavtalu, sum verður eitt ávíst áramál, og sum kann leingjast eftir tørvi, og sum kann uppsigast av báðum pørtum, og leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina, og at hædd verður tikin fyri leiguútreiðslunum fyri fíggjarárið 2022.<br><br>Nýtt tilmæli til fundin í teknisku nevnd 2. desember 2022<br>Tekniski leiðarin mælir til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til leigusáttmála, har vega- og gartnaradeildin og húsavarðartoymið leiga seg inn í høllina hjá Sp/f Kes, og leiga 2/3 av høllini til sítt virksemið, og at málið verður viðgjørt í býráðnum umvegis fíggjarnevndina.<br><br>Nýtt tilmæli til fundin í fíggjarnevndini mánadagin 13. desember 2021<br>Tekniski leiðarin mælir fíggjarnevndini til at taka undir samtyktini í teknisku nevnd 2. desember 2021, har nevndin tók undir við fyriliggjandi uppskoti til leigusáttmála við tillaðingum, sum báðir partar eru komnir við, og at tillagaður sáttmáli verður lagdur fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina til støðutakan.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">11. november 2021.</td></tr>
</table>

31

**Tekniska nevnd 11. november 2021:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at heimila umsitingini at arbeiða víðari við einum leigusáttmála, sum skal verða klárur at leggja fyri teknisku nevnd í desember 2021, og at miða verður ímóti at bygningurin skal hýsa vega- og gartnaradeildini og húsavarðatoyminum, og at leigusáttmálin verður lagdur fyri býráðið í desember 2021 til endaliga viðgerð.

**Tekniska nevnd 02. december 2021:**
Nevndin tekur undir fyriliggjandi uppskoti til leigusáttmála við tillaðingum, sum báðir partar eru komnir við, og at tillagaður sáttmáli verður lagdur fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 13. december 2021:**

Fíggjarnevndin samtykti, at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd og mæla býráðnum til at samtykkja fyriliggandi uppskot til leigusáttmála millum Fuglafjarðar kommunu og fyritøkuna KES. Fíggjarnevndin mælir í hesum sambandi umsitingini til, at biðja útleigara um at seta áramálið fyri leiguna niður, til umleið 5 ár, og at kommunan ikki ger ov nógvar íløgur í bygningin, uttan tað neyðturviliga, ið skal vera í bygninginum, eitt nú køkur og vesi.

**Býráðið 16. desember 2021:**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd og fíggjarnevndini, og góðkendi fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála millum Fuglafjarðar kommunu og Sp/f Kes, har býráðið ynskti, at kommunala umsitingin ger neyðugar tillagingar í leigusáttmálanum. 32

## 60/21
## 21/00661-2 KJ-Hydraulik_Tilboð uppá feimaskinu_Talan er um multimaskinu av slagnum Timan 3300

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.12.2021 | 116/21 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 06.12.2021 | 54/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.12.2021 | 55/21 |
| 4 Býráðið | 16.12.2021 | 60/21 |



## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Fuglafjarðar kommuna raðfestir høgt at halda býin reinan. Í verandi støðu hevur kommunan fingið avtalu við Klaksvíkar kommunu um at feia vegirnar hjá kommununi.<br>Ynskir hava verið frammi um ,at kommunan fær sær eina maskinu, sum verður oyramerkt til at feia býin og halda økini rein. Maskinan er ein multimaskina, tvs. at hon kann annað enn at feia. Maskinan er útgjørd við einum súgvara, sum sýgur avfalli á vegnum upp í ein tanga, sum verður tømdur regluliga. Eisini er hon útgjørd til at tøma vegristir. Eisini er hon útgjørd við einum spísplógvi til kavagrevstur, sum er vælegnað til gongubreytir, og einum saltspreiðara.<br>Ætlannin er, at hendan maskinan er í gogd alla tíðina í sambandi við at halda havnaøkið, vegir og økir reint.<br><br>Tekniska deild metir, at feimaskinan verður nýtt á øki 6 og 7, og at feimaskinan kann fíggjast av báðum økjunum.<br><br>**Ískoyti til fundin í vinnu- og havnanevndini 6. desember 2021**<br>Tekniska nevnd tók undir við tilmælinum um at taka av tilboðnum frá KJ-Hydraulik, og at tekniska umsiting saman við vinnu- og havnanevndini finnur peningin til endamálið.<br><br>**Ískoyti til fundin í fíggjarnevndini mánadagin 13. desember 2021**<br>Málið um fíggingina av feiimaskinuni hevur verið fyri í teknisku nevnd 2. desember, har nevdin samtykti at fíggja kr. 163.655,- av øki 6, og í vinnu- og havnanevndini 6. desember, har nevndin samtykti at fíggja kr. 500.000,- av øki 7. |

| | |
|---|---|
| | Tekniski leiðarin hevur verið í samtáð við kommunustjóran um fíggingina av íløgukeyi, sum verður fíggja yvir tvey fíggjarøkir, og er niðurstøðan tann, at málið má fyri í býráðnum umvegis fíggjarnevndina. Onki er sett av til keyp av feiimaskinu í 2021.<br>Tøkur peningur er á íløgukontoini fyri kirkjugarðin, sum hoyrir til øki 6, RS 637, og tøkur peningur er á rakstrarkontoini RS 650, sum hoyrir til øki 7.<br><br>**Framhald 14. desember 2021**<br>Við støði í tilmæli frá tekniska leiðaranum, teknisku nevnd og vinnu- og havnanevndini samtykti fíggjarnevndin á fundi í gjár, at tilmæla býráðnum at keypa nevndu sópingarmaskinu og samfíggja hana av økjunum 6 og 7, ítøkiliga rakstrarstøðunum 637, kirkjugarðar íløga, og 750, Fuglafjarðar havn.<br><br>Fíggjarlig játtan er ikki sett av til keyp av nevndu sópingarmaskinu á fíggjarætlanini fyri 2021. Sambært §§ 40 og 41 í kommunustýrislógini, so er aðalreglan tann, at eingin útreiðsla má haldast, fyrr enn neyðug játtan er fingin til vega.<br><br>Nevndu ásetingar í kommunustýrislógini eru soljóðandi:<br><br>**§ 40.** Tá fíggjarætlanin er endaliga samtykt, verður eisini útskrivingin av kommunuskattinum fyri komandi árið samtykt við fíggjarætlanini sum grundarlag. Samtykta fíggjarætlanin er á sama hátt bindandi fyri kommunalu umsitingina komandi fíggjarárið.<br><br>**§ 41.** Kommunustýrið hevur játtanarmyndugleika. Ikki kann verða farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.<br><br>Tá játtanin í sambandi við hetta keyp ikki er fingin til vega, so má býráðið taka endaliga støðu til – umvegis avvarðandi nevndir og fíggjarnevnd – um sópingarmaskinan kann samfíggjast av nevndu rakstrarstøðum á økjunum 6 og 7. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Raðfesta reinhaldið høgt og at kommunan ynskir eina nýggja maskinu til endamálið. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>§ 40 og 41 í kommunustýrislógini<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00661-1 KJ-Hydraulik_Tilboð uppá feimaskinu<br>Teldubræv, dagfest 26. november 2021, við svari frá kommunustjóranum til formannin í teknisku nevnd viðvíkjandi fyrispurningi um samfígging av sópingarmaskinu. |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at taka avtilboðnum áljóðandi 663.655,- u/mvg, og at kr. 163.655,- verður fíggja av øki 6, og at málið verður viðgjørt í vinnu- og havnanevndini í sambandi við restfígging.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í vinnu- og havnanevndini 6. desember 2021**<br>Tekniski leiðarin mælir vinnu- og havnanevndini at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd 2. desember 2021, um at taka av tilboðnum frá KJ-Hydraulik, og at tekniska umsiting saman við vinnu- og havnanevndini finnur peningin til endamálið, og at kr. at økið 7 fíggjar restupphæddina áljóðandi kr. 500.000,- u/mvg.<br><br>**Nýtt tilmæli til fundin í fíggjarnevndini mánadagin 13. desember 2021**<br>Tekniski leiðarin mælir til at fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd og vinnu- og havnanevndini, um at taka av tilboðnum frá KJ Hydraulik áljóðandi kr. 663.655,-, og at kr. 163.655,- u/mvg, sum er fyri tilhoyr til maskinuna, verður fíggja av íløgukontoini fyri kirkjugarðin, RS 637, og at kr. 500.000,- verður fíggja av øki 7, RS 750. | | |
| Dagf | 6. desember 2021. | | |



**<u>Tekniska nevnd 02. december 2021:</u>**
Nevndin tekur undir við tilmælinum um at taka av tilboðnum frá KJ-Hydraulik, og at tekniska umsiting saman við vinnu- og havnanevndini finnur peningin til endamálið.

**<u>Vinnu- og havnanevndin 06. december 2021:</u>**
Nevndin tekur undir við tilmælinum í teknisku nevn um at taka av tilboðnum frá KJ Hydraulik, og at havnastjórin finnur tøkan pening til endamálið.

**<u>Fíggjarnevndin 13. december 2021:</u>**
Fíggjarnevndin samtykti, at taka undir við tilmælinum frá tekniska leiðaranum og teknisku nevnd og vinnu- og havnanevndini, og taka av tilboðnum frá KJ Hydraulik viðvíkjandi keyp av sópingarmaskinu; og í hesum sambandi mæla býráðnum til at samfíggja maskinuna á kontunum RS 637 og RS 650.

**Býráðið 16. december 2021:**
Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælunum frá teknisku nevnd, vinnu- og havnanevndini og fíggjarnevndini, og góðkendi at samfíggjað sópingarmaskinuna av økjunm 6 og 7, rakstrarstøðunum 637 og 750.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 61/21
## 20/00106-88 Uppskot til semju millum Fuglafjarðar kommunu og Kappingareftirlitið í "loðsmálinum" við støði í rættarmeklingarfundi hjá Føroya Rætti tann 1. desember 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 16.12.2021 | 61/21 |

**Tilráðing**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
| Stutt lýsing | Hetta mál varð viðgjørt fyri afturlatnum hurðum sambært § 26, stk. 1 í kommunustýrislógini og § 1, 2. petti í fundarskipanini hjá Fuglafjarðar býráð. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Møguliga |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | | | |
| Dagf | | | |



Fundurin lokin kl. 21:25.

Gerðabókin lisin og góðkend.

Hendan síðan er tikin burtur úr almenna partinum av gerðabókini, tí lýsing og grundgeving av málinum, ið varð viðgjørt fyri afturlatnum hurðum, er skrivað á hesari síðuni.

Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Hendan síðan er tikin burtur úr almenna partinum av gerðabókini, tí lýsing og grundgeving av málinum, ið varð viðgjørt fyri afturlatnum hurðum, er skrivað á hesari síðuni.

Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

39

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

Eivin Breiðaskarð

Magni Jøkladal

David Andreasen

Ólavur Larsen

Gudny Vang

Lillian Jacobsen

Kristian Martin Petersen